## DAGSINS MEINING

# Miðlahúsið hálvt ár

Tað er nú hálvt ár liðið, síðani Sosialurin flutti heim í Vágsbotn og harvið setti skjøtil á spildurnýggja hugtakið MIÐLAHÚSIÐ. Eftir at hava húsast á Argjum í nærum fjórðings øld fekk blaðið nú innivist í sjálvum hjartanum á Havnini - fyri ikki at siga Føroyum. Hendingin hevði við sær stórar broytingar og nýggjar møguleikar, sum síðani hava verið troyttir eftir førimuni.

At fáa innivist á slíkum stað er eisini ein stór avbjóðing. Tað gevur møguleikar men setir eisini krøv. Tað er ikki nóg mikið bara við eini so forkunnugari adressu sum Tórsgøta 1. Skal nøkur livandi vera síggjast aftur í hesum góða umhvørvinum, og tað skal tað, so má eisini kjøt og blóð til. Tvs. at hølini umframt at hýsa dagliga blaðvirkseminum eisini kunnu gerast partur av gerandisdegnum hjá fólki flest. Vit hava tí latið dyrnar upp fyri nógvum ymsum tiltøkum. Her er Trapputingið so vorðið sjálvur hornasteinurin ella katalysatorurin - eitt demokratiskt forum, har lagt verður upp til orðaskifti um mongu av dagsins málum. Men hurðarnar eru eisini latnar upp fyri eitt nú mennandi tónleikalívinum her á landi.

Vit halda tað vera bæði rætt og rímuligt, at eitt miðlahús eisini er opið fyri almenninginum, og at tað roynir at geva sítt íkast til at skapa kjak og til at menna ymsu listagreinarnar í samfelagnum, tí í flestu førunum hava hesi tiltøk tilknýti til júst tað virksemi, sum eitt Miðlahús annars heilt náttúrliga umboðar. Okkara vón er at kunna menna hetta konseptið, soleiðis at tiltøk í húsunum fara at síggjast aftur á ymsu miðlapallunum tað veri seg blað, interneti og øðrum pallum við.

Enn er stutt frálíðið, síðani Sosialurin flutti inn í Vágsbotni og her setti skjøtil á hetta fyrsta veruliga føroyska miðlahúsið. Tað tekur tíð at menna slíkt konsept, men har vilji og hugflog eru til steðar, har ber eisini til at røkka langt. Tað skal vera okkara vón, at áhugafeløg oo. fara at gera brúk av hesum møguleikanum at byggja brýr millum tey og samfelagið annars á hesum miðlahúspallinum. Seinasta tiltakið í húsunum var í sambandi við altjóða sálarheilsudagin og var evnið happing. Hetta er nakað, sum fjølmiðlarnir eiga at seta fokus á, og tað hendi eisini undan og eftir tiltakið í Miðlahúsinum. Tað er so heldur ikki ókent í okkara grannalondum, at teir stóru fjølmiðlarnir og miðlahúsini lata dyrnar upp og skipa fyri kjakfundum oø. tiltøkum. Eitt nú er hetta nærum gerandishending á danska blaðnum Politikken, sum troytir sera góðu plasering sína á Ráðhúsplássinum til slík tiltøk. Og harvið er við til at menna orðaskiftið og upplýsing.

Í vikuskiftinum verða tvey tiltøk í Miðlahúsinum. Fríggjadagin verður bókaframløga, tá Jústinus Eidesgaard, rithøvundi fer at leggja fram nýggju bók sína KAJ2. Leygardagin fer tónleikabólkurin Paradox at hava útgávukonsert. Fleiri spennandi og mennandi tiltøk verða restina av árinum eins og vit eru við til at leggja eina sera áhugaverda skrá fyri komandi ár. Áhugað kunnu venda sær til okkara við fyrispurningum og ynskjum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Koltursbjarnatænasta

**Tveir limir í kendastu bóndaætt Føroya hava í seinastuni verið frammi og úttalað seg um framtíðina hjá búnaðinum í Føroyum. Annar tók risastig inn í nútíðina. Hin gørdi helst føroyskum bóndum eina bjarnatænastu.**

**Kári á Rógvi**



Jóannes Paturson bóndi Heima á Garði í Kirkjubø boðaði frá, at hann ætlaði at selja mjólkakvotuna og leggja seg meiri eftir mentunarligari tænastuvinnu. Hetta er at fegnast um. Tað er nú hálv øld síðani, at omma mín roknaði út, at tað loysti seg ikki at hava kúgv (hon hevði eisini kiosk). Nú á døgum verður jørðin hjá okkum tí í staðin havd til mentan og seyð. Seyðahaldið og alt tað, ið har uppií hongur, er fyri okkum mentan, heilsa, ítróttur og samanhald, ið skapa karmar um so mangt annað.

At bóndin nú eisini gevst at sópa undan neytum er stórhending í Føroya søgu. Tí hetta merkir kanska byrjanina til endan á teirri merkantilistisku tíðini í Føroyum. Við fríhandilssáttmála við Ísland og øðrum slíkum sáttmálum á veg, er eisini greitt, at almennu Føroyar halda, at vit skulu framleiða tað í Føroyum, sum loysir seg at framleiða - og tað, sum brúkarin vil gjalda fyri. Tað er sunt fyri øll at fáa skitt undir neglirnar viðhvørt, men so fá sum gjørligt skulu fáast við mykju burturav.

Eg síggi fyri mær, at tá tað misprýðandi fjósið er tikið niður, verða íløgur gjørdar í fróðskaparsetur, granskingardeplar og mentunarstovnar í Kirkjubø, har forna fróðskaparsetur okkara stóð - og sjálvsagt skal bóndin brúka alla sína tíð uppá at varðveita tað ótrúligu vitan og mentan, ið er bygd upp og ment har á garðinum. Hvør veit, seinni kanska bóndin letur part av haganum frá sær fyri ríkiligt endurgjald, so eisini kirkjubøskingar fáa lut í mentanini við ognarhøgum og traðum?

**Heildin**
Hin bóndin fór í bløðini at mjarra um traðirnar og ákæra tingmann fyri vina- og kenningapolitikk. Tíverri dugir hann ikki at síggja, at uppskotið at selja traðirnar er fortreyt fyri at bóndur við rímiligheit skulu sleppa at keypa fjós og bø. Hevði hann boðað frá, at bóndur tóku undir, ella hevði hann hildið sín gák, so var alt kanska í lagi, men nú gjørdi hann tíverri ikki tað.

Bóndin, ið eins og eg sjálvur, er meinigur limur í nevndini, ið skal endurskoða landbúnaðarpolitikkin, úttalar seg og sigur, at uppskotið um at lata traðarfólk keypa traðirnar órógvar arbeiðið hjá nevnd okkara. At einstakur nevndarlimur úttalar seg uttan at nevndin hevur hildið fund og uttanum formannin er ikki gamalt.

Temaið í greinini og í virkseminum hjá koltursbóndanum annars er, at tað onkursvegna er ein - og bert ein - rættur máti at gera tingini uppá, og at vit serfrøðingarnir onkursvegna hava innlit í henda rættleika og skulu upplýsa tingmenn um tað rætta, sum teir so fegnir og upplýstir skulu samtykkja.

Hetta er grundleggjandi misfatað, tí tað fólkaræði, vit hava í Føroyum, byggir á, at vit hava alment og opið orðaskifti og síðani taka støðu, um ikki orðaskiftið førir við sær semju. Veljari hevur vrakað henda Bjørn Patursson, ið heldur seg hava rætt at ráða yvir landsins landbúnaðarpolitikki, og valt aðrar inn á ting. Eisini almenni politikkur tjóðveldisfloksins er vinaligur og kenniligur mótvegis traðarfólki, tað stendur í stevnumiðum floksins, at "Neyðugt er sum skjótast... at betra um umstøðurnar... At hava traðir og innløgu av jørð til húsarhaldið."

Eg skilji ikki, at nevnd, ið ikki hevur nakað umboð fyri traðfólkið, skal hava einkarætt at viðgera spurningin um traðirnar. Bóndafelagið umboðar minnilutan (stórbóndurnar) av minnilutanum (bóndunum) av teimum, ið hava almenna almenna búnaðarjørð í hendi (tað eru fleiri traðarmenn enn bóndur).

Vit í óðalsefelagnum hava nógvar limir, ið eisini eru ella hava verið traðarmenn, og vit hava púra alment og opið í fleiri ár mælt til at selja leigarunum traðirnar. Verandi leigutraðir vóru lagdir inn undir greiðum lógarfestum og sáttmálafestum rætti at keypa, treytað av av trøðin varð velt. Vegna óheimilaðan politikk hjá jarðarfyrisitingi, og vegna lump og lirk frá teirri serfrøðinevnd, ið mælti til lógarbroytingina í 1988, eru sølurnar tíverri ikki avgreiddar enn.

Vit í óðalsfelagnum halda tað vera órímilig, óneyðugt og í grundini eisini ólógligt, at so er. Vit halda eisini, at tað ber ikki til við rætti og rímiligheit at grundgeva fyri, at bóndur skulu sleppa at keypa síni fjós, síni sethús og tann bøin, teir hava velt, um ikki tær eftiverandi gomlu leigutraðirnar verða avgreiddar og seldar traðarfólki ella eftirkomarum teirra.

**Hvør ræður nú yvir londum?**
Skulu vit tosa um vina- og kenningapolitikk, so er tað júst hetta at seta eina nevnd av teimum, ið ikki áttu at havt nakra støðu - fyrisitarar hjá vinnumálaráðnum og búnaðarstovuni, sum skulu umsita politikkin hjá løgtinginum - og teimum, ið hava egin áhugamál - bóndur, ið vilja hava traðirnar frá traðarmonnum, og óðalsmenn, ið antin sjálvir hava leigurtraðir ella øvunda teimum, ið hava.

Mín kæri vinur Henrik Old plagar at prika meg, tá óðalsfelagið kemur á fund í vinnunevndini, við at vísa mær á mjólkakrúss og siga: "hasum framleiða tygur ikki nógv av." Og rætt er tað. Nakrir óðalsmenn hava neyt og framleiða á vinnuligum grundarlagi, men flestir eru ikki í pengaligari vinnu, og flestir okkara halda, at landið heldur átti at stuðla útjaðara og ymsari ráðgevning og gransking enn at bekymra seg um, hvørt tað er fóðurið ella mjólkin, ið er innflutt. Vit hava sum kirkjubøbóndin staðfesta, at tað antin ikki loysir seg ella í øllum førum loysir seg illa at fáast við vinnligan landbúnað, og at nú løgmaður okkara skrivar undir ein fríhaldissáttmála fyri og annan eftir, so er avbjóðingin at umskipa almenna politikkin frá merkantilistiskum royndum at skapa vinnuligan landbúnað til at eina skipan, har nakrir fáir garðar framleiða tær stóru nøgdirnar, aðrir framleiða -

*Framhald á næstu síðu*

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.